

Oseberg B-pallurin. Mynd: Harald Pettersen - Statoil ASA

# Fáa ikki fatur á 40 prosentum av oljuni

**Jógvan Hugo Gardar**

27.08.2014 - 14:05

Oljan.fo

Greiningarfyritøkan Wood Mackenzie almannakunngjørdi í gjár eina frágreiðing sum vísir hvussu nógv tey meta virði er á tí sum er funnið av olju og gassi í norska landgrunninum.

Metingar vísa at tað eru tíggju milliardir sokallaðir oljuekvivalentir sum man veit um á norska landgrunninum. Av hesum skal vera møguligt at fáa fatur á umleið 60 prosentum.

Teknisk Ukeblad skrivar at við dagsins oljuprísum hava hesi 60 prosentini eitt samlað virði uppá einar 650 milliardir krónur.

Talan er um 206 fund á norska landgrunninum, og tey eru frá umleið einum milliónum føtum oljuekvivalentum til risan, Johan Sverdrup, har ein roknar við at talan er um heilar 2,4 milliardir føt av oljuekvivalentum.

Helmingurin liggur í Norðsjónum, meðan restin er javnt býtt millum Mið-Noreg, Norður-Noreg og Barentshavið.

Sambært greinarunum kunnu 4,8 milliardir føt pumpast upp, meðan 1,6 milliardir føt neyvan verða pumpaði upp. Orsøkin er millum annað at tað tøkniliga ikki letur seg gera, ella at trupult er at fáa fatur á hasum og flyta tað inn til oljuverkini.